

# Læknar fáa løn frá politinum

**LÆKNAKANNING** Tá ið politiið fær rokning frá Landssjúkrahúsinum fyri at hava skannað ein persón fyri, um viðkomandi hevur krógvað rúsevni innvortis, kemur rokningin frá yvirlæknanum og ikki frá Landssjúkrahúsinum. Hesa samsýning hava yvirlæknarnir rætt til

Randi Jacobsen

Tað hendir av og á, at fólk verða tikin í tollinum, tá ið tey koma til Føroya, og løgreglan hevur illgruna um, at tey hava goymt rúsevni innvortis.

Í teimum førunum fer politiið á Landssjúkrahúsið við viðkomandi og biðjur um at fáa fólkið skannað. Politiið hevur heimild at krevja slíkar kanningar gjørdar.

Tá ið kanningin er gjørd, verður rokning send politinum, men tað er ikki Landssjúkrahúsið, sum fær pengarnar. Rokningin kemur frá yvirlæknanum.

Einki illgrunasamt er í tí.

Yvirlæknarnir í Føroyum eru settir eftir eini »Aftale for lægelige chefer", og í tí avtaluni stendur, at yvirlæknar kunnu taka samsýning fyri »politierklæringer og erklæringer til retsligt brugnindeholdende nærmere motiveret skøn«.

Samsýningin fyri CT-skanning av búkinum er 5.600 krónur, og um kanningin verður gjørd uttan fyri vanliga arbeiðstíð, er samsýningin 7.000 krónur. Hetta eru somu upphæddir, sum danska privatsjúkrahúsið Hamlet tekur fyri slíkar kanningar.

### Fær ikki verið øðrvísi

Ætlanin var, at Landssjúkrahúsið skuldi fáa peningin og brúka hann til eitt nú starvsfólkaundirvísing og fríðkan av røntgenumhvørvinum.

Men tað bar ikki til. Landssjúkrahúsið kann ikki senda politinum eina slíka rokning, gjørdi Fútaskrivstovan Landssjúkrahúsinum greitt. Hinvegin bar til at flyta upphæddina á konto hjá viðkomandi yvirlækna, fekk Landssjúkrahusið at vita frá Fútaskrivstovuni, upplýsir Marius Rasmussen, leiðandi yvirlækni í Diagnostiska Deplinum á Landssjúkrahúsinum.

Seinasta heyst samtyktu tey á røntgendeildini, at yvirlæknin skal senda rokningina í egnum navni til løgregluna, sum síðan flytir peningin á kontu hansara. Yvirlæknin fær 2/3 av upphæddini, tí hann skal gjalda skatt og onnur avgjøld av B-inntøkuni. Hin triðingin skal yvirlæknin gjalda til felags kassa á røntgendeildini.

Hini starvsfólkini, sum luttaka í arbeiinum við at skanna, fáa onga persónliga samsýning, eitt nú radiografar.

Ein slík kanning er samansett av fleiri pørtum, og minst tveir persónar arbeiða við hesum í vanliga tveir tímar og viðhvørt longri.

- Tað besta hevði verið, um avroknað var millum Landssjúkrahúsið og politiið. Men Landssjúkrahúsið hevur ikki gjørt avtaluna, og tá hitt ikki ber til, er hendan loysnin við, at røntgendeildin fær ein part, ein brúkilig loysn, sigur Allan Skaalum, sjúkrahússtjóri.

Viðmerkjast skal, at samsýningin, sum yvirlæknarnir fáa fyri skanningarnar, ikki er nakað stórt ískoyti til lønina.

Frá mai í fjør til nú hevur politiið goldið samanlagt 46.200 krónur fyri sjey skanningar.

Harav fekk røntgendeildin 15.400 krónur, og yvirlæknarnir fingu 30.800 krónur.

*randi@sosialurin.fo*

## Fakta

Samsýningin fyri CT-skanning av búkinum er 5.600 krónur, og um kanningin verður gjørd uttan fyri vanliga arbeiðstíð, er samsýningin 7.000 krónur.

Lækning persónliga sendur rokning, og politiið flytir pengarnar á konto hansara.

Frá mai í fjør hevur politiið goldið 46.200 krónur fyri hesar skanningar

# Artimetis Investments vitjar Sjómannadagin

**SJÓMANNADAGUR** Á Føroya Sjómannadegi leygardagin 21. august verður stór móttøka fyri Livari Nysted og Leven Brown, skipara á Artimetis Investments, sum saman settu nýtt heimsmet við at rógva tvørtur um Atlantshavið

Tíðindaskriv

Skráin fyri Sjómannadagin byrjar longu mikudagin 18. august við stórari fiskikapping á Kósabrúnni. Eftir fiskikappingina fara børn og vaksin umborð á nøkur sjórænaraskip, og so verður stórt vatnkríggj á Vágni.

Leygardagurin 21. august er fyltur við kappingum og framsýningum av ymsikum slagið á Stangabrúnni í Klaksvík. Harafturat er nógv virksemi á Vánni og aftur í ár vitjað stóru træseglskipini og føroyskir træbátar á Sjómanna degnum.

### Stór móttøka fyri Livari

Leygardagin 21. august klokkan 13 verður stór móttøka fyri Livar Nysted og Leven Brown sum í við bátinum Atemis Investments, róðu úr New York í USA til Falmouth í Ongland.

Livar og Leven koma rógvandi inn eftir vágni og leggja at bryggju við stóra pallin á Stangabrúnni. Har verður báturin drigin upp á land og Sjómannadagurin heiðrar Livari og Leven. Síðani verður høvið at síggja heimskenda bátin, Atemis Investments, sum verður sýndur fram á bryggjuni saman við Dianu Victoriu, sum Ovi Joensen, sáli, róði úr Føroyum til Keypmannahavnar. Eisini verður Rospiggen II sýndur fram á bryggjuni. Rospiggen II er báturin, sum Aina Cederblom í 1933 silgdi úr Svøríki til Føroya og so víðari til Grønlands.

Almenna skráin verður í Norðlýsinum, sum verður borið í hvørt hús í Føroyum mikudagin 16. august.

# Seinsummarstevna á Sandoynni

Sandoyarstevnan verður heima á Sandi í ár frá 20. til 22. august. Ungmannafelagið Virkið skipar fyri stevnuni.

Fyrireikararnir siga, at nógv gott verður á skránni so sum tombola, ríðing á hestabaki, matsøla og barr, kafè, miðnáttarrøða og sangur, hoppiborgir, forvitnisligar framsýningar, túrar útimøti og mangt annað. Eisini verður ein minnissteinur avdúkaður í Søltuvík.

Skráin kemur út til øll sandoyggjafólk í næstum.

Sandoyarstevnan er á hvørjum ári í Sandoynni. Í fjør var hon í Skopun, í ár á Sandi, komandi ár verður hon í Skálavík og síðani í Húsavík. Seinast stevnan var á Sandi, var í 2006, siga fyrireikararnir.